

www.oljan.fo

**Jan Müller** 06 - 07 - 2012

# Insiderhandil í norsku oljuvinnuni

Í Noregi hava myndugleikarnir varhugan av, at oljuarbeiðsmenn hava kunnað skyldfólk og vinir um nýggj oljufund, áðrenn tíðindini eru vorðin almenn, og at tað hevur elvt til insiderhandil við partabrøvum í oljufeløgum. Í hvussu er hevur Fíggjareftirlitið illgruna um, at fleiri oljuarbeiðsmenn hava sagt frá einum oljufundi, tí fleiri norðmenn hava verið so ótrúliga hepnir á partabrævamarknaðinum, at teir eru nú meldaðir fyri ólógligan insiderhandil. Tað skrivar Dagens Næringsliv, sum eisini veit at siga, at fleiri fólk vórðu meldað seinasta heyst. -Tað sigur seg sjálvt, at tað er vandi fyri, at fólk siga ov nógv, tá mong av starvsfólkunum í oljuvinnuni ikki vita, hvussu viðkvæmar upplýsingar skulu viðfarast, sigur marknaðarstjórin í Fíggjareftirlitinum, Erik Blunæs, við Dagens Næringsliv. Blaðið skrivar, at teir illgrunasomu handlarnir vórðu avgreiddir, áðrenn børsurin í Oslo fekk upplýsingar um okkurt jaligt ella neiligt í vinnuni. -Vit hava ikki meldað nakran fyri at hava likið tíðindini, men løgreglan ræður fyri, um hon fer at kanna tann partin av málinum eisini, sigur Erik Blunæs. Hann vil ikki siga, hvørjum oljufelagi teir opnu oljuarbeiðsmenninir arbeiða hjá.